| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**23. februar 2006** | Blað nr.:<br>**6482**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **23. februar 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **25/06-46/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

Nú fóru Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen

**25/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 23. februar 2006:** Tikið til eftirtektar.

**26/06** **2002-0721**

**Karlamagnusarbreyt - miðstaðarøki, øki 1-6**

**Miðstaðargøta/-øki í Hoyvíkshaganum**

**Hoyvíkshagin Suður 2. byggistig:**
Byggideildin hevur í samráð við teknisku deild gjørt uppskot til vegalinjur í Hoyvíkshaganum Suður 2. byggistig. Hesar eru vístar á tekning, dagfest 6. november 2001 (j. nr.200200721/2), sum er hjáløgd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við uppskotinum frá byggi- og býarskipanardeildini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mars 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Tekniska nevnd 9. apríl 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyri standandi samtykt frá mars/apríl 2002 um góðkenning av vegalinjum í Hoyvíkshaganum Suður 2. byggistig. J. nr. 200200721.

Víst verður eisini til heildarætlan fyri TK, har uppskot er um at leggja eitt miðstaðarøki/handilsgøtu í Hoyvíkshaganum og til tann stóra eftirspurningin eftir vinnu- og handilsøkjum umframt íbúðum.

Um kommunan fór undir at gera vegin, sum gongur frá økinum, har kirkjan skal verða, og niðan til nýggja útstykkingina, verður útboðið av miðstaðarbygging nøktað fleiri ár fram í tíðina.

Ætlanin er, at hetta skal verða ein seyrigøta, tvs. hon ikki er ætlað til skjóta og gjøgnumkoyrandi ferðslu. Harafturímóti er ætlanin, at gangandi og koyrandi, ið hava ørindir í økinum, verða raðfest hægst.

Miðstaðargøtan verður uml. 600 m. Kostnaðarmeting er ikki gjørd, men við einum kostnaði upp á kr. 15.000,00 pr. leypandi metur, verður kostnaðurin uml. 9 mió. kr.

**Tilmæli :**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kommunan leggur pening út til projektering, soleiðis at arbeiðið verður klárt at bjóða út at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. november 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2003:** Samtykt at leggja upp til kr. 500.000,00 út fyri projektering.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til vegabreidd, raðfesting og útsjónd á Miðstaðargøtuni.

Hjálagt eru tekningar við frágreiðing og fyribils kostprís, j. nr. 200200721.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið, so tað kann latast ráðgeva at projektera.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2004:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur lagt fram eina skipanarætlan fyri Hoyvíkshagan sunnari partur, har ætlaða miðstaðargøtan er týðandi partur av, sí j. nr. 200400773.

Hjálagt eru tekningar við frágreiðing og fyribils søluprís, j. nr. 200200721-12.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið, so tað kann latast ráðgeva at projektera.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2004:** Samtykt at beina málið í ferðslunevndina og teknisku nevnd í sambandi við vegbreiddina, innan málið verður lagt fyri nevndina aftur.

**Ferðslunevndin 27. apríl 2004:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Robert Thomassen og Michael Jacobæus koma at greiða frá málinum.

**Ferðslunevndin 14. september 2004:** Greitt var frá málinum.

Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti og vísir til, at fylgjandi fyritreytir mugu verða yvirhildnar:

1) Steðgiforboð í báðum síðum á Miðstaðargøtuni.
2) Av- og áskipan má loyvast uttan fyri meldurtíðir.
3) Parkeringsmøguleiki knýttur at virkseminum við Handilsgøtuna.
4) "Moderat" ferðsla í meldurtíðini og í dagtímunum ísv. t.d. útsølu.

**Tekniska nevnd 28. september 2004:** Nevndin samtykti í máli nr. 200402273 at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Samtykt at skipa fyri felagsfundi við teknisku nevnd alt fyri eitt í sambandi við vegabreidd v.m.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanar- & tekniska nevndin 4. oktober 2004:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við fyriliggjandi uppskoti og at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, um at játta kr. 500.000 til at gera projektið liðugt at leggja fyri nevndirnar aftur til støðutakan.

Nevndirnar samtyktu eisini, at fyrilit skal takast til møguliga busskoyring, soleiðis at ferðslan ikki verður tarnað av, at bussurin steðgar.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at leggja út kr. 500.000,00 aftrat.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva latið gera projekt við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri vegarbeiðið við veitingum av mistaðargøtuni Karlamagnusarbreyt.

Í uppskotinum eru viðurskifti viðv. busskoyringini viðgjørd og mett verður, at eingin busskoyring eigur at koyra eftir mistaðargøtuni.

Arbeiðsøkið, ið talan er um, er frá komandi Torginum við Kirkjustrætið og niðan til vegamótið til útstykkingina Hoyvíkshaga Suður.

Umsitingin saman við ráðgeva greiðir frá fyriliggjandi uppskoti. Greitt verður frá samlaðu kostnaðarmetingini fyri alt vegarbeiðið. Støða skal takast til, um kommunan skal fara undir vegarbeiðið í einum, hvussu leingi arbeiðið ætlandi skal verða, og hvussu kommunan skal fáa afturgoldið møguligt útlegg fyri vegarbeiðið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við fyriliggjandi projekti (j. nr 200200721/26)
at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina
at leggja málið fyri fíggjarnevndina
at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión

**Tekniska nevndin 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at halda felagsfund við byggi- og býarskipanarnevndina í komandi viku.

**Tekniska nevnd & byggi- og býarskipanarnevndin 9. mars 2005:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við fyriliggjandi projekti j. nr. 200200721/26 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja 1/3 upp til kr. 5.000.000 av konto 90 og at leggja upp til kr. 10.000.000 út av samlaðu kostnaðarmetingini upp á kr. 15.000.000.

**Býráðið 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin á teknisku deild 30. mai 2005, kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol (j. nr. 2002-0721/44), og tilmæli verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum at taka undir við tilboðnum frá p/f Guttesen & Staksberg, áljóðandi kr. 12.221.397,00, sambært lisitatiónsprotokoll, dagf. 30. mai 2005, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu

**Ískoyti:**
Vegagerðin av Karlamagnusarbreyt er boðin út, og arbeiðið er í gongd.

Kunnandi fundur verður í næstum við áhugaðar keyparar til grundøkini, tí er neyðugt at fíggjarnevndin ásetur søluprís, sølutreytir o.a.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Samtykt at selja til kostprís, øki fyri øki, og at áseta sølutreytir sambært ásetingini hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
**Skipan av Miðstaðargøtuni**

Økið er, býarskipanarliga sæð, ein miðstaðargøta, ið kemur at liggja sum ein strukturellur felagsnevnari fyri allan Hoyvíkshagan Suður, og er tað tískil umráðandi, at økið, samstundis sum tað skal vera partur av miðstaðargøtuni, eisini tillagar seg sín kontekst, ið er sethúsabygging og raðhúsabygging við bæði smærri og lægri eindum.

Býarskipan hevur gjørt uppskot til skipan av miðstaðarøkinum í Hoyvíkshaganum saman við Karlamagnusarbreyt. Sí kortskjal í ringbindinum ”Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum”. J. nr. 2002-0721/x, dagfest. 01.12.2005

Eisini hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri hetta økið. Sí uppskot í ringbindinum ”Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum”. J. nr. 2002-0721/xx, dagfest. 01.12.2005

Í stuttum kann sigast um ætlanina, at økið er hugsað sum eitt miðstaðarøki, ið skal húsa handlum, skrivstovuvirksemi, stovnum, samkomuhølum, list og aðrari mentan. Haraftrat er ætlanin at har skulu verða íbúðir og vinnuvirki, sum hóska seg at liggja saman við bústøðum.

Miðstaðargøtan er deild upp í 7 byggistig, við 6-10 byggifeltum í hvørjum byggistigi. Innanfyri hvørt byggistig, verða øll felagsøkini millum bygningarnar deild ímillum hesi 6-10 byggifeltini. Sí kortskjal í ringbindinum ”Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum”. J. nr. 2002-0721/x, dagfest. 01.12.2005.

**Felagsøkini/p-økini**
Hesi felagsøkini verða í stóran mun parkeringsøki, men kunnu eisini verða grøn øki ella meira skipaði fríøki.

Ein orsøk til at umsitingin metir tað verða rættast, at fleiri byggifelt eiga felagsøkini/p-økini saman, er, at tey bygdu økini hava eitt fjølbroytni í nýtslu, sum ger at útiøkini/p-økini styðja hvørjum øðrum í nýtslu. T.d. eru flest viðskiftafólk til handils dagligdagar eftir vanliga arbeiðstíð ella leygardagar, ímeðan aðrar tænastufunktiónir eru vitjaðar meira mitt á degi.

Harafturat er ynskiligt at gera eina miðstaðargøtu, har fólk fara at trívast. Tí skulu parkeringsøkini ikki gerast ov stór, so hesi ikki gera frástøðurnar millum bygningarnar fram við Karlamagnusarbreyt ov stórar. Somuleiðis skulu frástøðurnar til býlingarnar, ið liggja fram við Miðstaðarøkinum haldast tætt at Miðstaðarøkinum, og skulu hesi øki útformast/sniðgevast soleiðis, at hesi øki verða ein góð yvirgongd millum býlingarnar og Miðstaðarøkið.

Mett verður, at talið av bilstøðlum í mun til tað bygda økið er høgt, tá ið hugsað verður um nýtsluna á økinum. Tað bygda økið hevur eitt fjølbroytni í nýtslu, sum ger, at útiøkini/p-økini styðja hvørjum øðrum í nýtslu. Samlaða talið av bilstøðlum kann verða uml. 730, innanf yri bygda økið.

Um tald verða øki, ið liggja uppat miðstaðarbyggingini, t.e. innanfyri 20 metur frástøðu frá bygningunum, kunna uml. 200 bilstøðlar afturat fáast til vega.

Bilstøðlar, ið liggja við eini frástøðu 50-100 metrar, t.e. niðri við Hoyvíkshøllina, Hoyvíkar skúla, Nýggja Hoyvíkar skúla o.o. øki kunna eisini stuðla Miðstaðarbyggingini í serligum førum. Til samanberingar kann nevnast, at í dag, við árslok 2005, eru uml. 700 bilstøðlar í økinum, vit í dag rokna sum miðbýurin.

**Tilmæli:**
Býararktitekturin mælir til, at kommunan hevur kunnandi fund fyri møguligar keyparar, har kunnað verður um málið, soleiðis at møguligar viðmerkingar til málið kunnu gerast partur av málsviðgerðini. Endamálið skal vera, at kunna leggja endaligt uppskot til byggiskipan og serstaka byggisamtykt fyri á komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tann 20. desember 2005 var ein kunningarfundur við uml. 40 umsøkjarar til vinnuøki, sum lúka treytirnar fyri at liggja í miðstaðargøtuni.

Uppskotið var sum heild væl móttikið, og vóru ikki stórvegis viðmerkingar frá umsøkjarunum.

Eftir fundin hava umsøkararnir víst stóran áhuga fyri økinum.

Síðani málið var viðgjørt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini tann 6. desember 2005, er tilfarið meira gjøgnumarbeitt og gjørt klárt til eitt endaligt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Karlamagnussarbreyt.

**Tilmæli:**
Býararktitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskotinum til byggiskipan og serstaka byggisamtykt fyri Karlamagnusarbreyt og mælir býráðnum til at samtykkja serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2006:** Nevndin var kunnað um málið.

Samtykt at leggja málið fyri aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum til 16. januar 2006, og at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**27/06** **2001-1579**

**Endurskoða og víðka heildarætlanina fyri Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Á íløguætlanini fyri 2005 eru 200.000 krónur settar av til heildarætlanina.

Skotið verður upp fyri byggi- og býarskipanarnevndini, at heildarætlanin fyri Tórshavn, samtykt 2004, verður endurskoðað - ásannandi, at síðani ætlanin var gjørd, eru kommunumørk flutt, so stórt lendi er lagt aftrat í syðra og vestara parti av núverandi Tórshavnar kommunu, uttan at tað er tikið nevnivert við í heildarætlanina.

Endurskoðanin miðar eftir, at javnvág verður í framtíðar útbyggingini, so eitt nú Vesturbýurin og økið hjá fyrrverandi Argja kommunu verða raðfest hægri, og at økið hjá fyrrverandi Kirkjubøar kommunu hesumegin Reynið verður tikið við í heildarætlanina fyri Tórshavn. Í framtíðrætlanunum verður eisini miðað eftir, at trivnaðurin og menniskjað verða í fokus.

Í fyrstu syftu verður dentur lagdur á at raðfesta bústaðar- og vinnuøki í Vesturbýnum og økinum hjá fyrrverandi Argja kommunu við hartil hoyrandi møguleikum fyri trivnað við frílendum, spæliplássum, gøtum, ítróttarvøllum/hallum o.l. og atkomumøguleikum við vegum, brúm o.l.

Einstøk øki eru í heildarætlanini løgd av til umrøddu endamál í pørtum av hesum økjum, men í flestu førum liggja ætlanirnar um tey langt úti í tíðarætlanini, sum uppsett er í heildarætlanini. Staðfestast kann, at bústaðarøkið á hesum leiðum, sum eru løgd út í fyrstu framtíð, ikki tykjast verða bygd eftir teimum ætlanum, sum hava ligið fyri.

Ein stórur partur av hagtalsliga grundarlagnum undir teirri ætlaðu endurskoðanini liggur í tí tilfari, sum hesi seinastu árini er fingið til vega og gjøgnumarbeitt í sambandi við ta heildarætlanina, sum býráðið samtykti í 2004.

Annar liður í hesum arbeiði verður at gera uppskot um og ætlanir fyri, hvussu Tórshavnar kommuna kann skipa og nýta tær stóru víddir, sum kommunan er vaksin við við samanleggingini við Kirkjubøar kommunu. Her er talan um øki bæði til trivnaðarendamál, bústaðarendamál, vinnuendamál o.a.

Miðað verður eftir, at fyrri liður av setninginum verður liðugur til framløgu 1. oktober 2005 og annar liður tíðliga í 2006.

Fylgibólkur við politiskari og embætismannumboðan verður settur. Mælt verður til, at tríggir limir í byggi- og býarskipanarnevndini verða valdir í stýringarbólkin saman við býararkitektinum og býarverkfrøðinginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin verður javnan tikin við upp á ráð í arbeiðnum eins og skipað verður fyri dialogi við almenningin, áðrenn ætlanin verður løgd fyri býráðið til endaliga samtykt.

Býarskipanardeildin hevur tann verkliga partin av arbeiðnum um hendur og kann søkja sær serfrøðingaráðgeving.

Skotið verður upp at játta kr. 200.000 av íløgunum 2005 til arbeiðið.

Vísandi til omanfyristandandi verður mælt nevndini til at samtykkja

at farið verður undir at endurskoða heildarætlanina fyri Tórshavn, samtykt 2004, sum skjótast
at settur verður fylgibólkur við trimum limum úr byggi- og býarskipanarnevndini, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum og
at mælt verður býráðnum til - um fíggjarnevndina - at játta kr. 200.0000 av íløgunum 2005 til arbeiðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Nevndin mælir býráðnum til at velja í stýringarbólkin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, býararkitektin og býarverkfrøðingin.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndina.

**Býráðið 26. mai 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin varð kunnað um, at stýringarbólkurin viðv. heildarætlanini hevur skipað seg við Jógvani Arge sum formanni og Mikael Viderø sum skrivara.

Bólkurin hevur havt sín fyrsta fund við ráðgeva um møguleikarnar fyri at fremja ætlaðar broytingar í heildarætlanini fyri miðstaðarøkið.

**Ískoyti:**
Stýringarbólkurin hevur nú saman við ráðgevanum Rambøll Nyvig gjørt eitt uppskot til eina endurskoðaða heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu.

Smærri rættingar í uppskotinum eru eftir at gera.

Eisini er millum annað neyðugt at taka støðu til umsókn hjá p/f Jákupi á Dul, áðrenn støða kann takast til endaliga uppskotið til endurskoðaða heildarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Stýringarbólkurin fyri heildarætlanina hevur nú gjørt eitt endaligt uppskot til endurskoðaðu heildarætlanina fyri Tórshavnar kommunu.

Uppskotið er soljóðandi:

Býráðið samtykti í vár at endurskoða og víðka heildarætlanina fyri Tórshavnar kommunu. Tað er vanligt at endurskoða heildarætlanir við jøvnum millumbilum, og tað er neyðugt at víðka ætlanirnar, tá kommunan fær meiri lendi at ráða yvir.

Samtykt varð, at endurskoðanin skuldi miða eftir, at javnvág verður í framtíðar útbyggingini, so eitt nú Vesturbýurin og økið hjá fyrrverandi Argja kommunu verða raðfest hægri, og økið hjá fyrrverandi Kirkjubøar kommunu hesumegin Kirkjubøreyn verður tikið við í heildarætlanina fyri Tórshavn. Í framtíðarætlanunum verður eisini miðað eftir, at trivnaðurin og menniskjað verða í fokus.

Samtykt varð at býta arbeiðið í tveir partar. Tann fyri parturin var at endurskoða heildarætlanina fyri gomlu Tórshavnar kommunu, sum varð samtykt í 2004.

Tann seinni liðurin var at gera eina skipanarætlan fyri tann partin av fyrrverandi Kirkjubøar kommunu, sum liggur hesumegin Kirkjubøreyn.

Hetta varð gjørt eftir uppskoti frá byggi- og býarskipanarnevndini, sum eisini skeyt upp at seta stýringarbólk at standa fyri arbeiðnum. Í honum hava sitið Jógvan Arge, formaður, Mikael Viderø, skrivari, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Boði Haraldsson.

Bólkurin hevur arbeitt í tøttum samstavi við ráðgevan Rambøll og Nyvig. Uppskotið til endurskoðaða heildarætlan varð lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina í tveimum umførum og samtykt á serligum fundi, sum var týsdagin 14. februar.

Nevndin hevur einmælt tikið undir við uppskotinum.

**Snara býnum vesturá**
Tilfarið í málinum er víðfevnt. Metingar verða bygdar á hagtalstilfar, sum varð savnað inn til seinastu heildarætlan og dagført til dagin í dag.

Í hesi endurskoðaðu ætlanini verður roknað við einum árligum fólkavøkstri í meðal upp á 1,25 prosent. Í fyrru ætlanini varð roknað við 1,75 prosentum í vøkstri, men hetta hevur nevndin stillað eitt sindur niður.

Broytingarnar í endurskoðaðu heildarætlanini í mun til ta fyrru eru serliga, at størri dentur verður lagdur á býarmenning (t.e. útstykkingar og bygging av bústøðum, ansingar- og tænastustovnum o.l.) í Vesturbýnum og á Argjum.

Tað er fyri tað mesta gjørt á tann hátt, at ætlaðar byggingar og útstykkingar vestanfyri eru skundaðar fram í tíðarætlanini árini 2005 til 2022, sum heildarætlanin nú fevnir um.

Umvent merkir tað, at tað verður ikki lagt so stórt trýst á Hoyvíkshagan so tíðliga í heildarætlanartíðarskeiðnum, sum ætlanin annars var.

Tað vestasta, hendan heildarætlanin fevnir um, er Hamarin á Argjum, og tað norðasta er økið við Stórutjørn í Hoyvíkshaganum uttanfyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og Løgmannabreyt.

Harímillum eru ymisk øki, sum eru løgd út serliga til bústaðarbygging, men eisini til bygging av skúlum og miðstøðum og stovnum av ymsum slag, sum hoyra einum framkomnum býi til.

Sum dømi um aðra nýggja útstykking kann nevnast, at ætlanin er at binda saman millum Norðasta horn og Miðhorn, og ætlanin er eisini at fara undir útstykking Undir Vesturvarða í Flatnahaga.

**Avløgd øki verða ikki nýtt**
Byggi- og býarskipanarnevndin ásannar, at plánurin fyri menning av vestaru býarpørtunum hevur ikki verið nóg góður. Hendan ætlanin er ein roynd at bøta um tað.

Nevndin ásannar eisini, at landið hevur fingið fleiri stór øki á hesi leið til taks til almennar byggingar, sum ongan veg ganga. Miðnámsdepil hevur verið í umbúna í Marknagili í mong Harrans ár uttan at nakað hendir, og Fróðskaparsetrið hevur fingið til gávus lendi á somu leið, men ætlanir eru eftir øllum at døma ongar at gera nýtslu av lendinum.

Hetta arbeiðir ímóti okkara býarplánlegging og darvar okkara býarmenning. Tí er hetta ein spurningur, sum vit fyrr sum seinni eiga at taka upp. Tað er rætt at leggja stór øki av til almennar stovnar og tænastur. Tey eru at meta sum ein partur av av býarpørtunum, og tá landið ikki ger brúk av teimum, mugu onnur ráð helst takast.

Tað ber illa til, at stórar víddir liggja ónýttar mitt inni í býarpørtum, tí tá ber illa til at fáa teir at rigga sum tann heild, teir eiga at vera.

Við øðrum orðum eigur tí almenna onkursvegna at verða settar treytir fyri, nær ella hvussu skjótt byggjast kann. Verður ikki bygt innan eitt ávíst áramál, mugu vit lata lendið fara til annað, kanska líknandi endamál, og útvega tí almenna lendi aðrastaðni.

**Endurskoða javnan**
Heildarætlanir eiga at verða endurskoðaðar javnan. Hendan heildarætlanin byggir á ta ætlanina, sum varð gjørd í 2002 og 2003 og samtykt í 2004. Við síni samtykt um at taka arbeiðið upp aftur hevur býráðið ásannað, at endurskoðan og víðkan er neyðug.

Vanliga verður roknað við, at slíkar ætlanir verða endurskoðaðar o.u. fjórða hvørt ár, og tað eiga vit eisini at seta okkum fyri.

Tá farið verður undir næstu endurskoðan, skula nøkur ár leggjast aftrat. T.d. eitt fimm ára skeið frá 2022 til 2027.

Stýringarbólkurin og byggi- og býarskipanarnevndin fara nú at seta ferð á arbeiðið at gera eina skipanarætlan fyri økið hjá Kirkjubør kommunu hesumegin Kirkjubøreyn. Tað er sjálvsagt, at úrslitið av hesum arbeiði so ella so fer at hava ávirkan á hesa ætlanina, sum nú er framløgd.

**Byggisamtykir endurskoðast**
Síðuloypandi verður arbeitt við eini ætlan at endurskoða byggisamtyktirnar í kommununi. Serliga verður arbeitt við almennu byggisamtyktini, men arbeitt verður eisini við serstøkum byggisamtyktum fyri ymisk øki.

Hetta arbeiðið verður ætlandi liðugt til heystar.

Miðbýurin er eisini ein týðandi lutur í framtíðarplánlegging.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur gjørt eina samtykt um, hvat miðbýurin fevnir um. Umsitingin arbeiðir við uppskotum um framtíðarskipan av miðbýnum, sum á sín hátt eisini skal fylgja við tíðini í góðum samljóði við tað, sum frammanundan stendur. Sjá mál nr. 399/05 2005-3220.

Høvuðsendamálið við uppskotinum til endurskoðaða heildarætlan er at stinga út í kortið, hvørji øki ætlanin er at nýta til ymisk endamál í býarmenningini.

Tað, sum er mest ítøkiligt, er sjálvsagt tað, sum liggur fyrst fyri. Tað, sum liggur longur frammi tíðini, verður javnan endurskoðað.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir býráðnum til at samtykkja uppskotið til endurskoðaða heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Stýringsbólkurin mælir til, at góðkenna uppskotið til endurskoðaðu heildarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og at senda tað til býráðið til endaliga góðkenning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Nú komu Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen

**28/06** **2004-1548**

**Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, j. nr. 200101579, har lagt verður upp til, at Tórshavnar kommuna, við einum miðvísum arbeiði at menna miðbýin, ger eina miðbýarætlan, ið loyvir meirbygging í miðbýnum við upp til 25%, hevur umsitingin gjørt uppskot til Heildarætlan fyri Dr. Jakobsens gøtu/ Sverrisgøtu, har meirbygging verður loyvd fyri matriklarnar, ið marka upp til gøturnar báðar.

Ætlanin við hesum er at økja um tættleikan kring tað, ið lagt verður upp til skal koma at verða handilgøta/gongugøta í miðbýnum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-1.

Økið, ætlanin fevnir um, skal síggjast sum ein týðandi partur av miðbýarætlanini, har ein nýggj handilsgøta/gongugøta kann koma at virka sum bindingslið millum verandi og komandi miðbýarfunktiónir.

Ein slík gøta fer at verða eitt natúrligt bindingslið millum tvær potentiellar miðbýarlundir við gamla kirkjugarð og verkætlanina um eina miðbýarlund við Tinghúsvegin millum Bøkjarabrekku og Áarvegin, j. nr. 200400607.

Arbeitt hevur verið áður við einari líknandi ætlan, j. nr. 200101692, men bleiv ætlanin tá ikki førd út í verki. Táverandi ætlan bleiv væl móttikin av teimum avvarðandi, men manglandi støðutakan til pakeringstrupulleikar høvdu við sær, at ætlanin var løgd aftur til umsitingina at arbeiða víðari við.

Í dag hevur Tórshavnar kommuna lagt eitt ávíst arbeiði í at útvega fleiri parkeringspláss kring miðbýin, og er tað tískil uppá sítt pláss at henda ætlanin verður tikin fram aftur, nú vísast kann á fleiri parkeringspláss í nærøkinum. Sí kortskjal j. nr. 200401464-2.

Arbeitt hevur somuleiðis verið við at ávísa ferðslumøguleikar millum gøtuna og hesi parkeringsøkir. Sí kortskjal j. nr. 200401464-3.

Heildarætlanin leggur tó upp til, at beinleiðis krav til bilstøðlar á sjálvum matriklinum hjá teimum, har meirbygging verður loyvd, ikki skal setast, - hetta fyri at ætlanin um eina slíka handilsgøtu/gongugøtu skal kunna fremjast. Víst verður á, at sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu *§ 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, stk. 6*, verður í heildarætlan fyri avmarkað økið, lagt upp til at slíkt frávik kann gevast.

Heildarætlanin loyvir matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, eitt byggistig uppá 0,8 og eitt nettunýtslustig uppá 2,0, og er ætlað at liggja sum 1. grundøkið.

Kjallarahæddin verður ikki tald við í nettonýtslustignum, og verður hon roknað eftir leistinum fyri 1. grundøki annars. Hetta hevur við sær, at ásetingarnar fyri økið skulu broytast fyri tann partin av Dr. Jakobsens gøtu, sum í dag liggja sum A1-øki.

Somuleiðis skal heildarætlanin positivt nevnast í almennu byggisamtyktini sum eitt avmarkað øki, har serligar ásetingar eru galdandi.

Uppskot til broyting av ásetingum er lýst á kortskjal j. nr. 200401464-4.

Heildarætlanin ásetur, at handlar skulu vera í hæddini við atgongd til gøtuna. Hinar hæddirnar kunnu verða til skrivstovur, smærri virki, sum natúrliga hoyra heima í sambandi við eina handilsgøtu/gongugøtu, stovnar og íbúðir.

Modell í 1:200 er gjørt, ið lýsir ætlanina, sum hon kann taka seg út í samspæl við restina av miðbýnum.

Víst verður í modellinum á, hvussu ein slík gøta kann útvega neyðuga tættleikan, samstundis sum hon hevur røttu staðsetingina til at gerast ein dygdargóð handilsgøta/gongugøta í miðbýnum.

Kortskjøl lýsa, hvussu staðsetingin við frástøðu til parkering, busssamband, torg, stovnar og aðrar handlar stuðla undir gøtuna. Bústaðartættleikin í innara miðbýi stuðlar somuleiðis undir menningina hjá gøtuni. Sí kortskjøl j. nr. 200401464-2,3,4,5 og 6.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskoti um broyting av ásetingunum fyri økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, soleiðis at meðan broytingin verður viðgjørd eftir lógarfestu mannagongd, sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, kann arbeiðast víðari við at gera uppskot til ferðsluviðurskifti, útsjónd og aðrar reglugerðir at leggja fyri nevndina aftur.

Víðari mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at umrødda økið, víst á kortskjal j. nr. 200401464-4, skal positivt nevnast í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu § 2. Ásetingar fyri 1. Grundumráði, sum eitt stk. 8:

"Fyri bygging á ognunum fram við Dr. Jakobsens gøtu, frá gamla kirkjugarðinum, og Sverrisgøtu niðan í Tinghúsvegin, kann byggivaldið geva serloyvi til bygging, sum tað metir hóskandi til at stimbra gøtuna sum handilsgøtu /gongugøtu."

Endaliga mælir býararkitekturin til, treytað av at broytingin av byggisamtyktini verður framd, at nevndin tekur undir við uppskotinum um at gera eina heildarætlan fyri økið, har byggistig og nettonýtslustig verða ávikavist 0,8 og 2,0.

Kravið um útvegan av fleiri parkeringsplássum í sambandi við meirbygging, verður slept, og avroknað sum ásett gjald fyri skipan av parkeringsplássum í nærøkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. juni 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera heildarætlan fyri økið og at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini sambært framløgdum kortskjali j. nr. 200401464-4.

Harumframt samtykti nevndin, at niðasta hædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil ella matstovur), og at gongubreytirnar skulu verða yvirdekkaðar við markisum ella karnappum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið frá Jógvani Arge um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Tórfinn Smith.

Síðan var atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið var samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**Ískoyti:**
Svar er nú komið frá landsmyndugleikunum um broytingina av byggisamtyktini, har broytingarnar bert lutvíst verða góðkendar.

Innlendismálaráðið hevur góðkent, at tann parturin av Dr. Jakobsens gøtu, sum var í A1 øki, verður broyttur til 1. grundumráðið.

Ætlaða uppískoyti í ásetingarnar fyri 1. grundumráðið

*"Fyri bygging á ognunum fram við Dr. Jakobsens gøtu, frá gamla kirkjugarðinum, og Sverrisgøtu niðan í Tinghúsvegin, kann byggivaldið geva serloyvi til bygging, sum tað metir hóskandi til at stimbra gøtuna sum handilsgøtu /gongugøtu."*

bleiv ikki góðkent.

Ætlanin við hesi broyting er at loyva hægri bygging fram við "nýggju handilsgøtuni". Fyri at hesin parturin av broytingini skal kunna góðkennast, og heildarætlanin fyri "nýggju handilsgøtuna" skal kunna fremjast, er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Heildarætlanin loyvir matriklunum, ið marka upp til Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, eitt byggistig uppá 0,8 og eitt nettunýtslustig uppá 2,0.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at umsitingin ger eina serstaka byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu við grundarlagi í heildarætlanini fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt til serstaka byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu við grundarlagi í heildarætlanini fyri økið er gjørd og verður løgd fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir byggisamtyktina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin hevur nú ligið frammi og seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum var 17. januar 2006.

Eitt broytingaruppskot er móttikið. Hetta er frá J. P. Gregoriussen vegna ánararnar av "Bládýpinum", Erling og Erlindur Simonsen, sum reka gistingarhúsvirksemi í húsaognunum matr. nr. 252a, 254e og 254k.

Teir biðja staðiliga um, at serstaka byggisamtyktin eisini kemur at umfata matr. nr. 254e og 254k. Somuleiðis verður biðið um at matr. nr. 254a, sum nú verður brúkt sum vegøki, verður tikið uppí byggisamtyktina. Ætlanin er her, at vegøkið skal varðveitast, men kann yvirbyggjast í 2. og 3. hædd.

Bygningarnir á omanfyri nevndu ognum eru ótíðarhóskandi og nú verður hugsað um nýbygging. Men tó er neyðugt, at allar ognirnar verða lagdar undir serstøku byggisamtyktina fyri at fáa nýggja bygningin nóg rúmligan, og at byggingin í framtíðini kann bera seg fíggjarliga.

Serstaka byggisamtyktin fyri Sverrigøtu/Dr.Jakobsensgøtu er ætlað til at loyva bygningunum fram við gøtuni at byggja víðari og hægri fyri at menna gøtuna sum handilsgøtu.

Um uppskotið til serstaka byggisamtykt verður broytt soleiðis, at omanfyri nevndu ognir, sum liggja í aðru røð frá gøtuni verða tiknar við, kann hugsast at fleiri umsóknir fara at koma inn um broyting av byggisamtyktini.

Allar ognirnar, sum byggisamtyktin fevnir um, eru nevndar í uppskotinum til serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at halda fast um serstøku byggisamtyktina sum var samtykt í býráðnum 6. oktober 2005, vísandi til at ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er, at loyva meira bygging fram við Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu, fyri at menna hesa sum handilsgøtu, og ikki at breiða hesa hægri byggingina út yvir ein størri part av miðbýnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Málið útsett til komandi fund.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt smærri tillagingar í uppskotinum til serstøku byggisamtyktina fyri Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at halda fast um serstøku byggisamtyktina sum var samtykt í býráðnum 6. oktober 2005, við smærri tillagingum, vísandi til at ætlanin

við hesi serstøku byggisamtyktini er, at loyva meira bygging fram við Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu fyri at menna hesa sum handilsgøtu og ikki at breiða hesa hægri byggingina út yvir ein størri part av miðbýnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, vísandi til kortskjal dagfest 14. februar 2006.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**29/06** **2005-2728**

**Lendi til fótbólsvøllin í Nólsoy.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Neyðugt verður at gera avtalu við eigararnar av matr. nr. 162 og 167 um keyp ella makaskifti av lendi til fótbóltsvøllin.

Talan er um uml. 95 ferm. burtur av matr. nr. 162 og uml. 85 ferm. burtur av matr. nr. 167.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at ogna sær uml. 95 m² burtur av matr. nr. 162 fyri 60,00 kr. pr. m² ella við makaskifti og 85 m² burtur av matr. nr. 167 við makaskifti.

**Býráðið fyri læstum hurðum 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Eigarin av matr. nr. 167 vil í sambandi við gerð av fótbóltsvøllinum í Nólsoy keypa írestandi økið millum Matvørubúðina og yvir móti SEV-húsinum, tvs. 154 m² burtur av matr. nr. 208, sí hjálagd kort frá 10.10.2005, tekning 04-05.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja 154 m² av matr. nr. 208, Nólsoy, fyri kr. 60,00 pr. m².

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**30/06** **2005-3147**

**Umsókn frá Advokatfelagnum, dagfest 16. november 2005, viðv. matr. nr. 807c.**

Í sambandi við sølu av ognini hjá deyðsbúgvinum eftir Ceciliu Brockie verður biðið um loyvi, at servitutturin um forkeypsrætt verður strikaður.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsóknin skuldi eisini fevna um matr. nr. 807f.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**31/06** **2002-2772**

**Uppskot til fundarskipan fyri serstøku bygginevndirnar.**

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna fundarskipanina.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**32/06** **2005-2414**

**Mál viðvíkjandi keyp av restøki millum matr. nr. 1217c og Hoyvíksvegin**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsókn komin frá Verkfrøðingastovuni vegna p/f Svend Krosstein um at keypa restøkið millum matr. nr. 1317c og Hoyvíksvegin á sama hátt sum p/f Poul Michelsen.

Einki er til hindurs fyri at selja økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at p/f Svend Krosstein fær loyvi at keypa økið millum matr. nr. 1317c og Hoyvíksvegin, soleiðis at umleið 3 m eru til gongubreytarkant. Markið skal fylgja markinum hjá p/f Poul Michelsen.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja ognina fyri kr. 98,00 pr. m².

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**33/06** **2006-0321**

**Føroyskt Íslandsrossafelag, umsókn um víðkan av øki felagsins undir Kráarheyggi í Havnardali.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Føroyskt Íslandsrossafelag søkir um víðkan av leiguøkinum til ríðivirksemi í Havnardali.

Umboð felagsins hava verið á fundi við umsitingina og avrátt varð at søkja um at víðka økið samsvarandi hjáløgdu tekning.

Matr. nr. partur av 1160a Flatnahagi.
Eigari: Tórshavnar kommuna.
Leigari: Júst Rubeksen.
Vídd: 60.260 m² (gl. øki. 28.520 m²).

Byggisamtykt: D2 ítróttur (partur av økinum) Harav 21.150m² eru í 4. grundumráði.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti og at beina málið til fíggjarnevndina at gera nýggjan sáttmála við Føroyskt Íslandsrossafelag og at boða verandi leigara frá broytingunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at broyta leigusáttmálan samsvarandi.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**34/06** **2005-1244**

**Útstykking í Kaldbak.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært korti yvir Kaldbak er næsta útstykkingin sett at verða innan fyri barnagarðin.

Staðbundnu limirnir í Kaldbak ynskja at vita, hvat kommunan sigur til, at útstykkingin verður aðrastaðni í bygdini, møguliga frá barnagarðinum og út móti bygdini. Her hava teir hugsað nógv um støddina av bygdina, og hvussu bygdin verður meira samansjóðað og soleiðis betur trivnaður.

Trupulleikin við eini útstykking úteftir móti bygdini er tann, at bóndin, ið eigur hesa jørðina, framvegis hevur neytahald, og tí vildu limirnir hoyrt, hvørjar møguleikar kommunan kundi bjóðað hesum bónda í býti fyri jørðina.

**Kaldbaksnevndin 25. mai 2005:** Nevndin tekur undir við ætlaðu útstykkingini innan fyri barnagarðin og heitir á kommununa um at ogna sær øki til útstykking av sethúsastykkjum uttan fyri barnagarðin til framhald av útstykkingini.

**Kaldbaksnevndin 14. september 2005:** Nevndin mælir kommununi til beinan vegin

at fara undir ætlaðu útstykkingina innan fyri barnagarðin,
at kommunan sum skjótast ognar sær øki til útstykking av sethúsastykkjum uttan fyri barnagarðin, og
at málið verður lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja, at kunnað verður um, hvussu langt málið er komið. hvussu long tíð gongur, áðrenn farið verður undir arbeiðið at stykkja út frá barnagarðinum og inneftir, og hvussu gongur við málinum at ogna sær lendi frá barnagarðinum og úteftir. Ynskiligt er at hetta mál verður avgreitt sum skjótast, soleiðis at grundstykki aftur verða til sølu í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2005:** Kunnað var um, at málið verður lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina 5. desember 2005.

Staðbundnu umboðini fáa boð um niðurstøðuna á fundinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan, sum leggur upp til, at kommunan letur gera útstykking upp á 8-9 grundstykki innan fyri dagstovnin Flatnagarður.

Arbeitt verður við at gera uppskot til útstykking uttan fyri dagstovnin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin tekur undir við uppskotinum, soleiðis at arbeiðast kann víðari við at lata verkætlanina til projektering at leggja fyri nevndina aftur.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at kommunan fer undir at ogna sær lendið bæði innan fyri og uttan fyri dagstovnin Flatnagarður.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av lendi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið 2 tilboð upp á projektering av útstykking í Kaldbak:

| | |
|---|---|
| HMP consult | 54.375,00 kr. v.mvg |
| UP Verkfrøði Sp/f | 113.750,00 kr. v.mvg |

Sundurbýtt verður sambært tekning nr. 001 og tinglýst verður við upplýsingum um garðskyldu v.m.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka av tilboðnum frá HMP Consult.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at leggja út fyri kostnaðin.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**35/06** **2003-0406**

**Umsókn frá Lenu Mørk og Aage Andersen, dagfest 18. februar 2003, um keyp av geira at leggja saman við matr. nr. 881 b.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Søkt verður um at keypa eina ál fram við teirra grundstykki, ið liggur í Vallalíð 13. Orsøkin til at tey vilja keypa geiran er, at tey vilja sleppa undan at verða innikleimd á parkeringsøki teirra, eftir at byggingin av ellisheiminum við Vallalíð er liðug.

Tað kann jú roknast við, at fleiri av íbúgvunum verða flutt haðani í kistu, og tá er lítið at ivast í, at parkeringsøki okkara tíðum verður fylgt av bilum, sum verða til stóran ampa fyri okkara til- og frákoyring.

Tað er teirra fatan, at bústaður teirra er meinast raktur av byggingini, og halda tey tí, at tað vildi ikki verið annað enn rímiligt, um at tey á henda hátt kundu loyst ein part av teirra trupulleikum, sum annars kunnu roknast at koma.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av, at sundurbýtið er í samsvari við heildarætlan fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Útsett vegna býráðsfund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2003:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 10. apríl 2003:** Samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2003:** Málið verður útsett, til greiða er fingin á málinum viðvíkjandi bygging av stovni í Vallalíð.

**Fíggjarnevndin 1. apríl 2004:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Sjúrður Olsen og Schumann Hjaltalin, mælir býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanar-nevndini og selja økið fyri kr. 97,00 fermeturin.

Ein minniluti, Leivur Hansen, mælir til, at málið verður útsett, til endalig greiða er fingin á málinum viðvíkjandi bygging av stovni í Vallalíð.

**Býráðið fyri læstum hurðum 22. apríl 2004:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen og Tórfinn Smith.

Ímóti atkvøddu: Jógvan Arge og Elin Lindenskov, tí málið ikki varð fullgott lýst.

**Ískoyti:**
Nýggj umsókn, dagfest 22. mars 2005, um loyvi at keypa uml. 1 m aftrat tí fyrr keypta økinum, soleiðis at parkeringsøkið verður 2,5 m íalt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at selja økið fyri 98 kr. fermeturin og senda málið í byggi- og býarskipanarnevndina í sambandi við marknaumskipan.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. apríl 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at marknaumskipan/sundurbýti kann fremjast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Nýggj umsókn um at keypa ein geira uppá 31 ferm. móti Vallalíð at leggja aftrat ogn teirra.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja 31 $m^2$ fyri kr. 98,00 pr. $m^2$.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**36/06** **<u>2006-0102</u>**

**Útfylling og gerð av grundøki til oljutangar á Viðarnesi.**

Í leiguavtaluni við Føroya Shell er avtalað, at nýtt grundøki skal gerast til 2 oljutangar á Viðarnesi.
Víddin á økinum verður umleið 1.500 $m^2$, og tað fara umleið 10.000 $m^3$ av gróti til útfyllingina.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera projekt og at bjóða arbeiðið út.

**Havnanevndin 27. september 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión, og komu hesi tilboð inn:

| | | |
|---|---|---|
| J & K Petersen | kr. | 1.646.950,00 |
| Articon | - | 1.347.850,00 |
| Byggitek | - | 1.151.687,00 |
| Karl Patursson | - | 1.988.500,00 |

Íroknað óvantaðar útreiðslur, trygging o.a. verður mett, at tað samlaða arbeiðið kemur at kosta kr. 1.500.000,00.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Byggitek.

Eisini verður mælt til at játta kr. 1.500.000,00 til tað samlaða arbeiðið at fíggja av kassapeningi.

**Havnanevndin 13. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**37/06** **2006-0375**

**Umsókn frá P/F Klosterboer Terminal Faroe Islands um leigu av øki til útbygging av frystigoymsluni hjá felagnum í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í umsókn, móttikin 26. januar 2006, søkir p/f Kloosterboer Terminal Faroe Islands um leigu av øki at útbyggja frystigoymsluna í Kollafirði umframt eina móttøku og avskipingarhøll við omankoyring.

Uppíbyggingin í frystigoymsluna verður gjørd í eystara enda av núverandi bygningi, og er talan um 875m² í vídd, og uppíbyggingin av móttøku og avskipingarhøllini verður gjørd í vestara enda av núverandi bygningi, og er talan um 260 m² í vídd + 310 $m^2$ til omankoyringina.

Tórshavnar havn hevur 25 ára leigusáttmála við Kloosterboer um leigu av grundøkinum til verandi frystigoymslu, sum er galdandi frá 2001.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at ganga umsóknini á møti og at leiga økið til umsøkjaran, og at hetta verður gjørt sum eitt ískoyti til verandi leigusáttmála, sum felagið hevur við Tórshavnar havn.

**Havnanevndin 13. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**38/06** <u>2004-0347</u>

<u>Kloakkskipan í Kúrdali 4. byggistig</u>

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
3. byggistig bleiv gjørt í 2001 og fevndi um kloakkina frá reinsiverkinum í Mýruni oman í Kúrdal.

Framhald av hesi kloakk bleiv projekterað av p/f Sofus Jakobsen, og er uppskot gjørt um at føra hesa í tunnil út á sjógv niður á - 8,4 m. Umsitingin leggur fram uppskot við kostnaðarmeting. Havast skal í huga, at kloakkin frá Hoyvíkshaga Suður verður førd í somu kloakk.

**Tilmæli:**
Vísandi til at kostnaðurin fyri arbeiðið er mettur at verða 1.600.000,00 kr., og bert 800.000,00 kr. eru avsettar í inniverandi fíggjarári, mælir býarverkfrøðingurin til at játta pening til alt arbeiðið seinni.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út í innbodnari lisitatión og komu tilboðini inn 30.januar 2006, og vóru tey hesi:

| | | |
|---|---|---|
| Articon P/F | kr. | 2.446.050,00 |
| J&K. Petersen Contraktors P/F | kr. | 2.487.045,90 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr. | 3.651.005,00 |
| Ístak hf | kr. | 3.723.539,00 |

Fyri omanfyri nevndu prísir er MVG ikki íroknað.

Harumframt hevði J & K Petersen contraktors p/f eitt alternativt uppskot uppá kr. 2.377.045,90 uttan MVG.

P/f Sofus M. Jakobsen mælir til at tikið verður við alternativa tilboðnum frá J & K Petersen Contraktors p/f, ljóðandi uppá krónur 2.377.045,90.

Afturat tilboðnum má roknast við 6,25% mvg - eftirlit í byggitíðini og 10% ókent, so samlaður kostnaður fyri arbeiðið verður kr. 2.946.084,90 (sí j.nr. 2004-0347/11).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at tikið verður við alternativa tilboðnum frá J & K Petersen contrators p/f, at játtaðar verða kr. 2.946.084,90 av íløgum fyri kloakkir, og at málið verður beint, um fíggjarnevndina, í býráðið.

Tekniska nevnd 9. februar 2006: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**39/06** **2006-0419**

**Kommunala Brennistøðin : Albøting av tekniskum skipanum : El-arbeiðið**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunala Brennistøðin hevur gjørt avtalu við p/f LM Electric um El-arbeiðið í.s.v. albøtingina av Brennistøðina.

Avtalan byggir uppá útflýggjað tilfar og samskifti í hesum sambandi, umframt budgetprís/tilboð frá p/f LM Electric, dagfest 25.01.2006, áljóðandi kr. 1.440.652,50 u/MVG. Við 6,25% MVG verður kostnaðurin sostatt kr. 1.530.692,75.

**Tilmæli**
Leiðarin á KB mælir heilsu- og umhvørvisnevndini til at mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at góðkenna avtaluna og at játta kr. 1.530.692,75 av íløgukarminum í 2006 á renovatiónsøkinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á KB treytað av, at heilsu- og umhvørvisnevndin tekur undir við málinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**40/06** 2004-1486

**Eigarafelagið Eystan Gil, søkir um stuðul til graslíki á fríøki.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsókn frá Eigarafelagnum Eystan Gil, dagfest tann 1. juni 2004, um stuðul til graslíkisvøll á spæliplássinum og vøllinum við Eystan Gil, sent til lendisdeildina tann 3. november 2004 til viðgerðar. Sí hjálagda skriv og semju millum úbúgvarnar í økinum.

Vøllurin er 15 x 30 m = 450 m² til víddar.

Søkt verður um stuðul kr. 119.375 kr.

Aðrir graslíkisvallir, Kaldbak, Hoyvík, Hamarin Argir og Norðasta Horn kosta hvør uml. 500.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at beina málið til mentamálanevndina til viðgerðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 40% av kr. 238.750,00, sum verður fíggjað av íløgum til skúlar 2005.

**Mentamálanevndin 2. februar 2005:** Samtykt at svara eigarafelagnum, at kommunan fer at gera eina heildarætlan av smáum graslíkisvøllum/ítróttarøkjum í kommununi, og verður málið tá viðgjørt av nýggjum. Heildarætlanin verður fyrst viðgjørd í byggi- og býarskipanarnevndini, áðrenn hon verður løgd fyri mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 4. februar 2005**, Skriv til eigarafelagið at kommunan ger heildarætlan og at teirra mál verður viðgjørt av nýggjum.

Eigarafelagið hevur latið gera vøllin og er hann í góðum standi og væl úr hondum greiddur.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at játta kr. 119.375 kr av konto 90-1248, ”Graslíkisprojekt”, sum stuðul til arbeiðið, sum eigarafelagið hevur staðið fyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 119.375,00 av konto 90-1248.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 119.375,00 av konto 90-1248, og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**41/06** **2004-0823**

**Eldávarningarskipan til nýggja skúlan/frítíðarskúlan við Hoyvíkar skúla.**

Húsaumsitingin mælir til at allir nýbygningar fáa sjálvvirkandi eldávaringaskipan.

Tað er ikki við í projektinum fyri frítíðarskúlan í Hoyvík, og tí hava vit biðið um tilboð frá p/f LM Elektric, sum eisini stendur fyri el-innlegginini.

Hoyvíkar skúli hevur slíka skipan, og kann skipanin fyri frítíðarskúlan bindast í hana, og soleiðis verður hon bíligari.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at játta kr. 115.000,00 av íløgum á skúlaøkinum til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 115.000,00, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**42/06** **2006-0474**

**Fyrispurningur frá Almanna- og heilsumálaráðnum, dagfest 6. februar 2006, um leigu av húsunum í Ovarugøtu til stuðulsskipanina.**

Sethúsasølan hevur fingið boð um at selja húsini, men eru tey tó ikki enn komin á sølulistan, j. nr. 2005-1369.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at leiga húsini fyri kr. 8.000,00 pr. mánað umframt ljós og hita.

**Býráðið 23. februar 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov Annika Olsen, Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen og Bjarti Mohr.

Ímóti atkvøddi: Sjúrður Olsen, vísandi til at talan er um sethúsaumráði.

**43/06** **2006-0354**

**Umsókn frá Gunnleyg Durhuus, dagfest 30. januar 2006, um at verða loyst úr starvinum sum trivnaðarstjóri frá 1. mars 2006.**

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at ganga umsóknini á møti og at lýsa starvið leyst.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mál uttan fyri skrá:**

**44/06** **2006-0480**

**Keyp av ognini, matr. nr. 212, Argir, við ástandandi húsum.**

**Fíggjarnevndin 13. februar 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um møguligt keyp.

**Býráðið fyri læstum hurðum 13. februar 2006:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at bjóða kr. 700.000,00 fyri ognina.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa ognina, 600 m², fyri 760.000 kr. at fíggja av konto fyri keyp og sølu av lendi.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**45/06** **2005-1476**

**Heildarætlan fyri økið vestan fyri ítróttarhøllina í Kollafirði**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsiting hevur latið gjørt uppskot til heildarætlan fyri økið kring ítrótttahøllina og skúlan og nýggju læknaviðtaluhølinini.

Fyri at ítróttarhøllin kann fáa nýtsluloyvi, er neyðugt at nøktandi parkeringspláss verða útvegað.

Ætlanin leggur upp til, at økið verður skipað sum eitt samlað felags parkeringspláss, serstakliga verður hugsað um parkeringsviðurskiftini hjá ítróttarhøllini og læknaviðtaluhølini.

Hjálagt er tilfar um ætlanina. j.nr. 2005-1476.

Kostnaðarætlan kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið, og heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Málið útsett til kostnaðarætlan fyriliggur.

**Ískoyti :**
Býarskipan hevur fingið til vegað kostnaðarætlan fyri verkætlanina. j. nr. 20051476/3.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið, soleiðis at arbeiðast kann við at bjóða arbeiðið út, og heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í mentamálanevndina í sambandi við fígging.

**Mentamálanevndin 17. januar 2006:** Málið varð umrøtt og beint til umsitingina til víðari viðgerð og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 250.000,00 av íløgum heilsumál, kr. 750.000,00 av íløgum á skúlaøkinum og 1,5 mill. kr. av íløgum á ítróttar og frítíðarvirksemi. Eisini verður mælt til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Eisini samtykt at innkomin tilboð verða løgd fyri mentamálanevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**46/06** **2004-2626**

**Umsókn frá Jógvan Hans Østerø um loyvi til útstykking av "Jákupstrøð", Velbastaður.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarin av matr.nr. 24, Velbastaður, søkir um loyvi til útstykking av trøðni til vanlig sethús. Víddin á grundøkjunum verður omanfyri 500 $m^2$.

Av tí at lendið er bratt, er ynski um at loyva serligum sniðum av húsum, eyðkend við at loftshæddin ikki hevur skráveggir, men einsíðugt takhall.

Umsøkjarin hevur sent eina heildarætlan, ið sýnir hvussu trøðin kann útstykkjast, og somuleiðis hvussu ein víðkað útstykking kann verða gjørd.

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í umráðispartinum sethúsaøki sambært galdandi byggisamtykt fyri Kirkjubø/Velbastað.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Trøðin, matr.nr. 24, er 11.176 m².

Útstykkjað verða 12-14 grundøki, vídd 500 $m^2$.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn j. nr. 200402626/1.
Tekningar j. nr. 200402626/2.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin fer á staðið fyri at fáa eina heildarmynd av økinum, í mun til verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. februar 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við málinum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin hevur, eftir áheitan frá umsitingini, sent dømi um byggimøguleikar, við longdar og tvørskurðum av parti av økinum, fyri at lýsa málið betur.

**Tilmæli:**
Útstykkingin av Jákupstrøð er í øki, sum er ætlað til sethúsabygging. Lendið er sera bratt, og áðrenn byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til útstykkingarætlanina, verður hon beind í teknisku nevnd til ummælis um møguleikar fyri vegum og tekniskum leiðingum í hesum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd at ummæla møguleikarnar fyri vegum og tekniskum leiðingum á matr. nr. 24, sum er Jákupstrøð á Velbastað, sjá kortskjal nr. 7, framlagt og undirskrivað á fundi 4. apríl 2005.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2005:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini tann 4. apríl 2005 at beina málið í teknisku nevnd, hevur tekniska deild viðgjørt fyriliggjandi tilfar um útstykkingarætlan. Eftir sum talan er um eitt skitsu-uppskot, fyriliggur einki tilfar um tekniskar leiðingar og verður hetta viðgjørt tá ið umsøkjarin hevur latið gera detailprojekt.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við fyriliggjandi útstykkingarætlan, tó so at vegabreiddin hjá umsøkjaranum Jógvan Hans Østerø, Jákupstrøð, verður 9 m. Mælt verður eisini til at umsøkjarin arbeiðir víðari við fyriliggjandi ætlan, at leggja fyri kommununa aftur, so at umsitingin kann viðgera útstykkingarætlanina sum eitt detailprojekt.

Býarverkfrøðingurin mælir eisini til at nevndin tekur støðu til um peningur skal setast av íløgum fyri 2006 at gera Gerðisbreyt lidna.

**Tekniska nevnd 28. apríl 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Nevndin samtykti eisini at umsitingin ger eina kostnaðarmeting fyri liðugtgerð av Gerðisbreyt at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at nýggir upplýsingar fyriliggja í málinum, hevur hetta ført við sær, at einki er til hindurs fyri at vegabreiddin á vegnum kann vera 8 m. Tískil ynskir umsitingin, at støða verður tikin til um arbeiðast skal víðari við hesi vegabreidd.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við at vegabreiddin kann verða 8 m.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at taka undir við at vegabreiddin kann verða 8 m. Og at heita á umsøkjaran at koma við tekniskum projekti fyri alla útstykkingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar-/Velbastaðarnevndin 4. juli 2005: (mál nr 2005-1651)** Nevndin samtykti at heita á byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevndina um at

bera so í bandi, at álagt verður útstykkjaranum at knýta útstykkingina í vegin í erva (gl. landsvegin), sí tekning 20050704.

**Tekniska nevnd 7. juli 2005:** Nevndin fór á staðið at kunna seg nærri um viðurskiftini.

Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen, samtykti at halda fast við áður gjørdu samtyktir í teknisku nevndini tann 28. apríl 2005 og 2. juni 2005 sambært galdandi byggisamtykt, góðkend tann 27. januar 2004 av Oljumálaráðnum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá staðbundnu nevndini tann 4. juli 2005.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá staðbundnu nevndini, verður málið lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtyktina í staðbundnu nevnd 4. juli 2005.
Býararkitekturin mælir til at nevndin staðfestur samtyktina frá 4. apríl 2005, um at loyva eina útstykking á Jákupstrøð til 12 stykkir við atkomu frá Gerðisbreyt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Nevndin staðfesti, at hon tann 4. apríl 2005, hevur tikið undir við eini útstuykking á Jákupstrøð, matr.nr. 24, Velbastaður, til 8 stykki við atkomu frá Gerðisbreyt og til 4 stykki við atkomu úr erva. Sambært kortskjali nr 7. framlagt á fundi 4. apríl 2005.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 12. september 2005:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Bræv er komið frá Advokatskrivstovuni, har heitt verður á Tórshavnar kommunu um at taka støðu til innkomna uppskotið til útstykkingarætlan og tekniska projektið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at heitt verður á umsøkjaran um at koma við nýggjari útstykkingarætlan, har atkoma verður frá verandi bygdarvegi í erva.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jacobsen, Bjarti Mohr og Marin Katrina Frýdal, samtykti heita á umsitingina um at kanna møguleikarnar fyri atgongd til ætlaðu útstykking á matr.nr. 4d úr gamla bygdarvegnum í erva ella av Stórheyggi.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at taka undir við útstykkingarætlanini hjá umsøkjaranum, sum tekur støðið í innkoyring frá Gerðisbreyt.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið millum umsitingina og umsøkjaran við advokati.

Umsøkjarin er komin við nýggjum uppskoti, sambært áheitan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin viðger innkomna uppskotið, og tekur støðu á komandi fundi, tí tilfarið er so nýtt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at arbeitt verður fram við verandi útstykkingarætlan og verandi tekniska projekti, og

at Tórshavnar kommuna keypir frílendið og neyðugt lendi til veg, uml. 1200 m², av matr.nr. 5a, Velbastað, til at gera veg av stórheyggi vestur til matr.nr. 4d,. sambært kostskjali 2004-2626/43.
at Tórshavnar kommuna ger vegin frá Stórheyggi og fram til markið hjá Jógvani Hans Østerø, uml. 100 m, og at býráðið rindar kostnaðin av hesum.
at Tórshavnar kommuna nú gevur loyvi til at fara í gongd við at útstykkja tey niðastu stykkini, nevnd P 25-P 30 og somuleiðis tey ovastu stykkini, nevnd P 1-P 8 á seinsta uppskotinum frá Jógvani Hans Østerø.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at vita, hvussu tað gongst við málinum.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 15. desember 2005:** Borgarstjórin kunnaði um gongdina í málinum.

Nevndin vísti á, at Gerðisbreyt stendur í hálvum gekki og er óegnað til tunga ferðslu.

Gerðisbreyt má tí gerast ferðslutrygg, áðrenn farið verður í holt við nakra útstykking.

**Ískoyti:**
Eigarin er komin við dagførdum tekningum av útstykkingarætlanini, har innkoyring verður frá Gerðisbreyt og frá Stórheyggi.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðkenna dagførdu útstykkingarætlanina og tekniska projektið. Harumframt verður mælt til at loyva sundurbýti sambært hesi ætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Útsett.

Umsitingin ger uppskot til nærri reglur um gjald fyri íbinding í kommunala vegakervið.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 16. januar 2006 og at játta 3 mió. kr. av konto 90 til gerð av vegum og keyp av lendi.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |